# Hava kavað í fimmti ár

**Fríggjadagin í farnu viku vóru liðin fimmti ár, síðani Tórshavnar Froskmannafelag varð stovnað. Tað vóru slóðbrótandi menn, sum byrjaðu at snorkla og kava undan hesum, men hendan dagin varð altso stovningarfundur felagsins hildin.**

HÁTÍÐARHALD
*Snorri Brend*

Við fimmti árum á baki er Tórshavnar Froskmannafelag elsta froskmannafelag í landinum. Um tað ikki er nóg mikið, so er felagið eisini næstelsta froskmannafelag í danska kongaríkinum.

Her kann til stuttleikar nevnast, at Føroyar umboðaðu alt kongaríkið nøkur ár í altjóða frítíðarkavarafelag skapinum CMAS.

Hetta var ikki so væl dámt í Danmark, men CMAS vildi bert loyva einum landi úr hvørjum ríki upp í felagsskapin. Og so leingi, sum Føroyar ikki vildi geva sítt pláss til Danmark, var einki at gera!

Hendan ósemjan bleiv tó seinni loyst í øllum góðum, ovasta ráðið í CMAS samtykti, at bæði Føroyar og Danmark kundu hava limaskap í felagnum ísenn.

## Húsvillir

Í dag heldur felagið til uppi á loftinum á Reinsarí'num í Tórsgøtu og í garaguni aftanfyri.

Men í løtuni fara stórar umbyggingar fram á økinum. Húsini og økið aftanfyri skal nýtast til annað mentanarligt endamál skilst á lagnum, so felagið hevur í løtuni eingi felagshøli at húsast í.

- Tað kenst eitt sindur hugstoytt at standa mestsum húsvill eftir fimmti ár í høvuðsstaðnum. Men í heyst verður væntandi funnin ein nøktandi loysn á hesum máli í samstarvi við Tórshavnar Kommunu, sigur felagið.

Í sambandi við runda føðingardagin fer felagið at halda ein aktivan føðingardag við kaving og øðrum á skránni. Um viðrar verður farið úr Hoyvík leygarmorgunin kl. 10.

Ætlandi gongur leiðin út á Hoyvíksfles til morgunmat og hugnaløtu. Til hetta tiltak eru allir limir felagsins og øll onnur áhugað vælkomin.

Njørður, sum er báturin hjá felagnum, verður tøkur, og fara vit at royna at fáa so nógv fólk sum gjørligt út á flesina til morgunmat.

Eydnast teimum ikki at koma út á flesina, verður dagurin ístaðin hildin inni á støðni í Hoyvík.



*Tá felagið fylti 45 ár vóru limir og onnur áhugað á Hoyvíksfles. Í ár – á 50 ára degnum – er ætlanin at gera tað sama*

## Sameindar kreftir

Grein 1 í lógum felagsins sigur soleiðis:

Navn felagsins er Tórshavnar Froskmannafelag.

Endamál felagsins er sambært stovningarfundin hin 3. august 1957: "Við sameindum kreftum at granska verðina undir vatnskorpuni


www.inni.fo

inni - Trygt og ómakaleyst til hús



**Brekkuskákið 4, 700 Klaksvík**

Húsini eru í 2 hæddum - hvør hæddin er góðar 130 fermetrar, samlað búvídd er góðar 260 fermetrar. Grundøkið er 451 fermetrar. Byggiár: 1949. Húsini eru stoypt og klødd við alminiumplátum, takið er úr tjørupappi og varð skift í 2003. Í erva er durur, gongd, køkur, 2 stovur, 3 kømur, baðirúm og hjúnarúm. Í neðra er kjallararúm / fýr / vaskirúm og goymslurúm. Í íbúðini, sum er í neðra, er durur, køkur / stova, gongd, kamar, baðirúm og hjúnarrúm. Húsini standa mitt í býnum og hava sera gott útsýni. Garður er runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

**Jørð í Norðdepli til sølu**

4. gl – 15 sk.
Talan er um matr. 128a
í Norðaraparti til sølu
um hóskandi boð fæst.

**INNI** Bøgøta 12 - Fo 700 Klaksvík - Tlf. 580610
P.O.Box 364 - inni@inni.fo - Fax 320510


# Ferðsluóhapp í Klaksvík

Á leið klokkan tíggju í gjárkvøldi hendi eitt ferðsluóhapp í Klaksvík. Ein bilur, sum var á veg frá Borðoyatunnilinum til Klaksvíkar, koyrdi út av vegnum við Grønaból. Til alla lukku hendi ongin mansskaði.

Tveir persónar vóru í bilinum, 18 ára gamli førarin og ein 17 ára gamal vinmaður. Teir sótu báðir í trygdarbelti, og onki rúsdrekka var innblandað, sigur Allan Manai av politistøðini í Klaksvík.

Persónarnir vórðu sendir á skaðastovu, har staðfest varð, at teir vóru slopnir óskalaðir frá hendingini.

Politiðið heldur, at óhappið hendi orsakað av ov nógvari ferð. Bilurin fór niðan av vegnum og rullaði runt fleiri ferðir.

- Tað var eitt undur, at ongin mansskaði hendi, tí bilurin fór rættiliga illa, og eg vænti ikki at hann verður til bil aftur, sigur løgreglumaðurin.

Lesið Sosialin - so eru tit við